## Atkvøða um fremmand

Í Bretlandi hevur tann almenna mannarættindanevndin gjørt av at leggja sak ímóti flokkinum British Nationalist Party (BNP), tí at flokkurin sýtir fyri at broyta tann partin av viðtøkunum, sum sigur, at bara hvít fólk kunnu vera limir í flokkinum. Leiðslan í flokkinum hevur svarað, at hon fer at spyrja verandi limir, um teir taka undir við at broyta viðtøkurnar, so fólk av øðrum etniskum uppruna kunnu sleppa uppí. Formaðurin í BNP, John Walker, sigur við CNN, at tað verður ikki lætt hjá fólki av øðrum uppruna at vera í flokkinum.



## Taliban ongar pengar

Italska stjórnin avsannar, at hon skal hava goldið Talibanleiðarum pengar fyri at fáa trygd fyri, at Taliban skuldi ikki søkja at italsku hermonnunum í Afghanistan. Blaðið The Times skrivaði í gjár, at Taliban-leiðarar og krígsharrar í Sarobi-økinum eystan fyri Kabul høvdu fingið fleiri túsund dollarar frá italsku stjórnini. Afturfyri skuldu teir italsku hermenninir í økinum sleppa undan álopum frá Taliban. Italski forsætisráðharrin, Silvio Berlusconi, vísir tíðindunum í The Times aftur. Hann sigur, at stjórnin hevur ongantíð góðkent at lata Taliban pengar.

# Føroyar ynskja egna binding í veðurlagsavtalu

**Nú Føroyar eru í ferð við at seta sær mál fyri minking av veðurlagsgassum fram til 2020, heldur Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í uttanríkismálum, at føroyska veðurlagsmálið eigur at síggjast aftur í nýggju altjóða veðurlagsavtaluni**

UMHVØRVI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ynski um eina sjálvstøðuga føroyska binding er fleiri ferðir sett fram fyri donsku stjórnini í undanfarna ári. Bæði á politiskum og embætismannastigi er gjørt greitt, at Føroyar ynskja at gerast partur av komandi altjóða veðurlagsavtaluni við eini binding, sum tekur atlit at føroyskum viðurskiftum og er beinleiðis galdandi fyri Føroyar.

### Ikki á mál

Tað er uttanríkisráðið við Jørgeni Niclasen á odda, sum stendur fyri sjálvum samráðingunum um bindingar, meðan sjálvt umhvørvismálið, sum ein slík avtala eisini er, liggur undir innlendismálaráðnum, har Annika Olsen er landsstýriskvinna.

Jørgen Niclasen sigur, at tað soleiðis er uttanríkisráðið, sum stendur á odda fyri samráðingunum við donsku myndugleikarnar um støðu Føroya í nýggju veðurlagsavtaluni.

- Enn er tó ikki komið á mál við eini loysn. Ein orsøk er, at framvegis er óvíst, hvat slag av bindandi avtalu fer at avloysa Kyoto-frumskjalið. Samskifti við donsku stjórnina heldur tó fram, og Føroyar hava gjørt vart við, at neyðugt verður at finna eina loysn áðrenn ST veðurlagsráðstevnuna í Keypmannahavn í desember.

### Føroyar sjónligar

Landsstýrismaðurin vísir á, at í núverandi støðu eru Føroyar nevndar við tí fyrivarni, ið er tikið fyri Føroyar í Kyoto-frumskjalinum.

Hetta fyrivarni sæst í staðfestingarskjalinum, sum er eitt yvirlit yvir, nær londini hava staðfest Kyoto-frumskjalið, leggur hann aftrat.



*- Føroyar vilja síggjast á ein positivan hátt í altjóða samstarvinum um veðurlagsbroytingar, sigur Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri, sum heldur, at vit mugu finna eina loysn við danir áðrenn ST veðurlagsráðstevnuna í Keypmannahavn í desember*

- Vit vilja síggjast á ein positivan hátt í altjóða samstarvinum um veðurlagsbroytingar. Tað eigur sjálvsagt at bera til at gera Føroyar sjónligar sum viðspælari, heldur enn bert sum eitt fyrivarni - uttan mun til, hvussu ein endalig avtala fer at síggja út, sigur uttanríkisráðharrin, Jørgen Niclasen.

# Politisk semja um minking í útláti

**Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri, sigur, at ein semja um minking í útláti er við at verða undir landi millum allar politisku flokkarnar í Føroyum, har Føroyar vilja skerja útlátið við 20% fram til ár 2020 – frá 2005 at rokna**

UMHVØRVI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sum skilst á uttanríkisráðharranum, Jørgeni Niclasen, eru politisku flokkarnir í Føroyum við at verða undir landi við eini politiskari semju um útlát av veðurlagsgassum.

- Eg haldi, vit eiga at seta okkum mál, sum eru framsøkin og realistisk. Í kortunum liggur, sum landsstýrismaðurin tekur til, at ein politisk semja um føroyskt útlát.

Jørgen Niclasen sigur, at tað, sum miðjað verður eftir, er ein skerjing í føroyska útlátinum við 20% fram til 2020 – at rokna frá 2005.



*- Samstundis, sum Føroyar brúka nógva olju í vinnuligum høpi, tí vit hava so stóran fiskiflota, eru vit eisini við til at tilføra heiminum nógvan mat úr havinum, sigur Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri*

- Eg haldi, at ein slík semja er við at verða undir landi millum allar politiskar flokkar í Føroyum, leggur hann aftrat.

Sum skilst, hevði Umhvørvisstovan, sum eisini hevur gjørt vart við seg í hesum máli, vilja sæð eina enn størri skerjing.

- Onnur lond vilja innføra kvotuskipanir fyri útlát av veðurlagsgassum, har "dálking" kann keypast, men vit vilja heldur seta okkum realistisk mál.

### Sjálvandi við

Landsstýrismaðurin vísir á, at tá tað er "trendurin", at heimurin skal dálka minni, eiga vit sjálvsagt at bera okkara part.

- Vit vita øll, at tann roykur, sum eitt nú kemur frá brenning av olju, dálkar. Eingin ivi kann vera um tað.

Jørgen Niclasen vísir á, at henda dálking eisini hevur eina fíggjarliga síðu.

- Av øllum innflutninginum, sum Føroyar høvdu í fjør, telir olja ein heilan fjórðing, og tað er ikki smávegis. Tí eiga vit sjálvsagt at royna at minka um oljunýtsluna og finna aðrar orkukeldur, sum bæði eru betri fyri umhvørvi og bíligari fyri okkum sum samfelag og fólk.

Landsstýrismaðurin endurgevur ein av partamonnum sínum fyri at hava sagt, at steinøldin helt ikki uppat, tí eingin steinur var eftir.

- Sama er við oljuni. Sjálvt um olja er eftir, eiga vit sjálvasagt at minka um nýtsluna, tí hetta bæði hevur týdning fyri umhvørvi og upp á longri sikt helst eisini fyri fíggjarligu umstøðurnar.

Jørgen vísir á, at málið hjá Føroyum eins og øðrum framkomnum londum í størri mun má vera at brúka av orkukeldum, sum antin eru varandi ella sum kunnu endurnýggja seg.

Hann sigur, at sum fiskivinnutjóð við lutfalsliga stórum fiskifota brúka Føroyar sjálvsagt nógva olju í mun til talið av íbúgvum.

- Føroyar fiska 11 tons av fiski fyri hvønn íbúgva, meðan Ísland, sum kemur á øðrum plássi í heimshøpi, fiskar 4 tons fyri hvønn íbúgva. Í ES-londum er talið bert 0,1 tons fyri hvønn íbúgva.

Jørgen Niclasen vísir á, at samstundis, sum Føroyar brúka nógva olju í vinnuligum høpi, eru vit eisini við til at tilføra heiminum nógvan mat úr havinum.